Neistin-StÍF 25-23 (14-10):

# Helena bjargaði Neistanum

**Tað var um reppið, at StÍF skapti eina veruliga sensatión í Havn, men tá mest stóð á, bjargaði Helena Dam Poulsen Neistanum við fleiri góðum bjargingum á rað**



*Tað gekk hjá Neistanum, men tað var um reppið, at tær gjørdust offur fyri eini veruligari sensatión, tá StÍF vitjaði sunnudagin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

HONDBÓLTUR – KVINNUR

*Jákup Mørk*

Dysturin í Hálsi millum bestu kvinnuliðini hjá Neistanum og StÍF tóktist í mangar mátar at verða eins og so nógvir aðrir, tá talan er um botnlið, sum vitjað eitt av oddaliðunum.

Fáur mundi ivast í, at her var bert talan um avgreiðsluspurning hjá Neistanum, og hetta sást eisini aftur í fámentu áskoðarafjøldini. Tey fáu tandrini, sum vóru møtt við dystarbyrjan, stavaðu eina mest frá teimum, sum høvdu eitt hvørt arbeiði at gera í høllini.

### Stríðsviljin sæst aftur

Fyrstu løtuna av dystinum var heldur ikki so nógv, sum bendi á, at Neistin skuldi hava nakrar stórvegis trupulleikar av dystinum. Tó at tær báðar útlendsku hjá StÍF gjørdu sítt, so dragnaði spakuliga millum liðini, uttan at Neistin tó á nakran hátt spílaði seg út.

At StÍF so eisini fekk kviku Annu Danielsen útvísta, tá hon fekk fatur í arminum hjá Mildrið Jacobsen í einum kontraálopi gjørdi so avgjørt ikki støðuna hjá gestunum betri.

StÍF hevur tó fleiri ferð á árinum sýnt ein framúr góðan stríðsvilja. Hóast yvirmaktin oftani hevur verið stór, so gevast tær ikki á hondum, og soleiðis var eisini hesa ferð.

### Helena vaknaði

Neistin hevði eina fýra mála leiðslu í hálvleikinum, men í seinna hálvleiki fór brádliga at styttast. Álopsspælið hjá Neistanum er avgjørt ikki hitt skjótasta í landinum, og tí dúva tær í stóran mun á sterku verjuna. Hendan fekst tó ikki at rigga nóg væl í seinna hálvleiki, og tí gjørdist setningurin í verjupartinum munin lættari hjá StÍF. At Helena Dam Poulsen í neistamálinum so heldur ikki leikti upp til sítt vanliga høga støði viðførdi, at munurin var púrasta burtur, tá tíggju minuttir vóru farnir av seinna hálvleiki.

Tær í Neistanum vóru alt annað enn álvuligar við støðuna, og hevði nakar orsøk at iðra seg eftir dystin, so vóru tað nevnliga gestirnir. Eftir at hava strítt seg upp á javnt, høvdu tær nevnliga fleiri góðar møguleikar at leggja seg framum við bæði einum og tveimum málum, men hetta eydnaðist tó ikki.

Fremsta orsøkin til hetta var, at Helena brádliga raknaði við úr dvala sínum. Tvær ferðir tók hon sær av brotskøstum, sum StÍF hevði fingið tillutað, og brádliga riggaði alt annað eisini. Hvørki gjøgnumbrotsroyndir ella skot frá bakkunum funnu vegin inn til meskarnar, og so kundi Neistin revsa við kontraspæli. Trý mál á rað avgjørdu tað mesta av dystinum, og tó at StÍF so spakuliga aftur fekk glið á, so eydnaðist teimum ongan tíð at koma somikið nær, at spenningur aftur kom í dystin.

### Silvurið hómast

Sum nevnt aðra staðni í blaðnum, so fekk Neistin eisini eina gávu úr Klaksvík sunnudagin, tá VB vann á Stjørnuni. Flestu viðhaldsfólkini hjá teimum bláu mundu helst hava avskrivað silvurmerkini eftir tapið í Klaksvík herfyri, men nú tykist Neistin brádliga vera best fyri í hesum. Verður sæð burtur frá dystunum móti VÍF, so hevur Neistin á pappírinum góðan møguleika at vinna tað, sum eftir er. Tær hava VB og Stjørnuna á heimavølli, meðan útidystirnir eru av lættara slagnum, og gevur alt hetta fulla úrtøku, so verður talan um silvur.

Hjá StÍF var dysturin hinvegin enn ein staðfesting av, at tær als ikki skulu roknast sum besta boðið til niðurflyting. Eftir eina vánaliga byrjan hevur liðið tikið seg fram í stórum, og tó at munurin til botnin bert er tvey stig, so er í løtuni lítið sum bendir á, at hesin munur fer at minka. Heldur øvugt.

### Dysturin í tølum

**Neistin-StÍF** 25-23 (14-10(

**Málskjúttar:**

**Neistin:** Gunnleyg Berg 8(4), Mildrið Jacobsen 5, Birita Wardum 4(1), Katrin á Neystabø 4(1), Súna Mørk 3, Kára á Dunga 1

**StÍF:** Alina Olaru 12(2), Anna Maria Bertelsen 4, Ileana Manulescu 3(1), Poula D. Olsen 2, Anna B. Danielsen 1, Sunfríð B. Jacobsen 1

**Brotskøst:** Neistin 8, StÍF 5

**Útvísingar:** Neistin 4, StÍF 2

**Diskvalifiakatión:** StÍF 1 (beinleiðis reytt)

**Dómarar úr Kyndli:** Uni Wardum & Hannis Wardum. Høvdu ongar trupulleikar, tá leikferðin fyri tað mesta var hampuliga lág.

## Oddadystur

Ein dystur í bestu kvinnudeildini verður leiktur í Vestmanna í kvøld, tá VÍF tekur ímóti Stjørnuni. Hetta eru tey bæði fremstu liðini í kvinnudeildini.

Mong høvdu undan endaspælinum roknað við, at hetta fór at gerast dysturin, har VÍF kundi staðfesta meistaraheitið, men sum gongdin hevur verið seinastu tíðina, so tykist hendan staðfesting longu at vera veruleiki.

Stjørnan hevur ikki havt nøkur serliga góð úrslit í seinastuni, og uttan tær báðar útlendsku, Andrijanu og Simonu, er lítið at ivast í, at VÍF fer at gera bart.

Dysturin byrjar kl. 18.30.

**-jm**

## Hondbóltsstøður

**1. Deild kvinnur**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 3 | 3 | - | 0 | - | 0 | 443 | 265 | 178 | 18 |
| 2 | Stjørnan | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 416 | 333 | 83 | 15 |
| 3 | Neistin | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 400 | 351 | 49 | 15 |
| 4 | VB | 5 | 4 | - | 1 | - | 0 | 397 | 395 | 2 | 15 |
| 5 | StÍF | 5 | 2 | - | 0 | - | 3 | 321 | 402 | - 81 | 5 |
| 6 | Sóljan | 6 | 1 | - | 0 | - | 5 | 330 | 499 | -169 | 4 |
| 7 | Kyndil | 5 | 0 | - | 0 | - | 5 | 392 | 454 | - 62 | 3 |

**1. Deild menn**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 4 | 4 | - | 0 | - | 0 | 470 | 386 | 84 | 19 |
| 2 | Neistin | 5 | 3 | - | 0 | - | 2 | 523 | 446 | 77 | 16 |
| 3 | StÍF | 5 | 4 | - | 0 | - | 1 | 470 | 454 | 16 | 14 |
| 4 | H71 | 5 | 0 | - | 2 | - | 3 | 470 | 498 | - 28 | 8 |
| 5 | Tjaldur | 5 | 2 | - | 0 | - | 3 | 423 | 478 | - 55 | 8 |
| 6 | Kyndil | 5 | 2 | - | 1 | - | 2 | 395 | 441 | - 46 | 7 |
| 7 | KÍF | 5 | 0 | - | 1 | - | 4 | 447 | 495 | - 48 | 5 |

## Máltindarnir

**Kvinnur:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Asta Petrauskiene | Sóljan | 153 | (24) |
| Simona Dziugyte | Stjørnan | 134 | (38) |
| Lotte Sørensen | Kyndil | 127 | (55) |
| Ioana Rápa | VÍF | 107 | (26) |
| Gabriella Fekete | VB | 105 | (27) |
| Ileana Manulescu | StÍF | 93 | (15) |
| Annika Ljósstein | Kyndil | 90 | (14) |
| Regina Radó | VB | 90 | (21) |
| Katrin á Neystabø | Neistin | 86 | (37) |
| Joan M. Joensen | Stjørnan | 82 | (5) |
| Anna K. Samson | Stjørnan | 73 | (1) |
| Birita Wardum | Neistin | 70 | (11) |
| Sóley Mikkelsen | VÍF | 70 | (13) |
| Andrijana Milodanovic | Stjørnan | 66 | (9) |
| Alina Olaru | StÍF | 65 | (9) |

**Menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Bjarni Wardum | H71 | 117 | (27) |
| Jacob Jónsson | Neistin | 114 | (15) |
| Heini Joensen | Neistin | 111 | (35) |
| Høgni Klein | Kyndil | 105 | (9) |
| Costin Dumitrescu | StÍF | 104 | (29) |
| Finnur Hansson | H71 | 97 | (22) |
| Dragisa Stojovic | Tjaldur | 96 | |
| Halgir Dahl Olesen | H71 | 94 | (11) |
| Ingi Olsen | VÍF | 91 | (11) |
| Artur Johansen | StÍF | 88 | (11) |
| Durica Tomic | KÍF | 88 | (23) |
| Iljan Topic | KÍF | 87 | |
| Sverri Justinussen | Tjaldur | 86 | (13) |
| Sámal Joensen | VÍF | 86 | (13) |
| Mortan Hansen | Tjaldur | 73 | (7) |



UTTAN ÚR HEIMI

Búskapur og vinna:

### Gass til Eysturevropa

Norðmenn hava rætti liga fingið fótin fastan á eysturevropeiska gassmarknaðinum, og líkt er til, at sølan kann veksa nógv afturat.

Sum er verður norskt gass flutt til Pólands, Kekkia og tann eystara partin av Týsklandi, har umleið 30 prosent av orkunýtsluni stava frá gassi. Russland er tó framvegis tann stóri gassseljarin á hesum leiðum, men tann russiski parturin av marknaðinum er minkandi.

### Góð ársbyrjan

Kinesisku hagtalsmyndugleikarnir boðaðu í gjár frá, at kinesiski útflutningurin í januar í ár var heili 25,7 prosent størri enn í januar í fjør. Talið er misvísandi, tí í Kina er nýggjárið ikki altíð sama dag, og verður tað tikið við í roknistykkið, var tann veruligi vøksturin í útflutninginum um tíggju prosent. Samanborið við onnur lond var hetta eitt gott úrslit.

Kina hevur eisini kent sviðan av afturgongdini, sum hevur merkt heimshandilin tað seinasta hálva árið. Sambært myndugleikunum vaks landsins útflutningur 6,8 prosent í fjør, og tað var ein munandi afturgongd samanborið við árið fyri, tá útflutningurin vaks heili 28 prosent.

### Nei til ES

Hóast fleiri leiðandi menn í norsku fiskivinnuni eru farnir at tosa um, at Noreg eigur at fara upp í ES, tykist hetta ikki hava havt stórvegis ávirkan har norðuri í landinum, har fiskivinnan hevur stóran týdning.

Í einari kanning sæst, at 62 prosent av fólkinum í Norðurnoregi siga nei til ES-limaskap. 38 prosent eru fyri. Hóast støðan sostatt er greið, er munurin minkaður hetta seinasta árið.

# Verjarnir hjá Milosevic klárir til álop



*Myndir sum hendan frá 11. februar í 1999 verða tiknar fram undir sakarmálinum ímóti Slobodan Milosevic. Her fara 40 albanar til gravar eftir eitt serbiskt hópmorð*

*Mynd: Reuters*

**Sakarmálið ímóti Slobodan Milosevic byrjaði í gjár. Altjóða nevndin, sum hevur sett sær fyri at verja hann, hevur valt at halda seg til gamla slagorðið, sum sigur, at álop er tann besta verjan**

MILOSEVIC-MÁLIÐ

*Árni Joensen*

Altjóða nevndin er komin til ta niðurstøðu, at hon skal ikki royna at verja Milosevic og gerningar hansara, tí tann uppgávan tykist ov trupul. Sjálvur hevur fyrrverandi jugoslaviski leiðarin eisini sagt, at hann vil ikki hava nakran at verja seg.

Ístaðin hevur nevndin tí sett sær fyri at leypa á ST-krígsbrotsmannadómstólin í Haag, sum sambært nevndini er eitt amboð hjá NATO, og sum skal rættvísgera avgerðina hjá verjusamgonguni at bumba mál í Jugoslavia. Álopið hjá nevndini verður tí eisini vent ímóti NATO.

Nevndin hevur longu roynt seg. Í fjør kravdi hon, at ein dómstólur í Amsterdam skuldi ógylda avgerðina at fongsla Milosevic, tí hetta var ólógligt. Men dómstólurin tók ikki undir við verjunevndini, sum síðani valdi at lata mannarættindadómstólinum í Strasbourg málið. Her er tað enn.

Verjunevndin hevur fleiri ferðir roynt at sannføra tíðindafólk og onnur um, at krígsbrotsmannadómstólurin í Haag er ólógligur, og nevndin hevur á tíðindafundi í Beograd sagt, at Milosevic er vorðin píndur í fongslinum í Hollandi. Hetta avsannaðu nakrir av nevndarlimunum koretini seinni.

Teir best kendu limirnir í verjunevndini hjá Milosevic eru fyrrverandi amerikanski løgmálaráðharrin, Ramsey Clark, og franski sakførarin Jacques Vergas. Teir og hinir nevndarlimirnir vilja vera við, at krígsbrotsmannadómstólurin hevur einans eina uppgávu, og tað er at fjala sannleikan.

- Endamálið er at geva teimum óseku skyldina, sigur kanadiski sakførarin Christopher Black, sum er næstformaður í altjóða verjunevndini hjá Milosevic.

# Aftur eitt bumbumistak

**Amerikanska blaðið Washington Post skrivar, at amerikanska flogvápnið enn einaferð hevur bumbað sivilfólk í Afghanistan**

AFGHANISTAN

*Árni Joensen*

Sambært blaðnum helt amerikanska herleiðslan, at fólkini vóru limir í yvirgangsfelagsskapinum al-Qaeda, og flogvápnið lat tí eitt ómannað flogfar skjóta eina rakett eftir bygdini Zhavar Kili har eysturi í Afghanistan.

Men frá fólki í bygdini hevur Washington Post fingið at vita, at teir tríggir menninir, sum doyðu í álopinum, høvdu als einki samband við al-Qaeda.

Álopið á bygdina var í síðstu viku, og dagin eftir søgdu amerikanararnir, at ein av leiðarunum í al-Qaeda doyði í álopinum. Men hetta avsanna bygdarfólkini í Zhavar Kili. Tey hava greitt tíðindamanninum Doug Struck hjá Washington Post frá, at teir tríggir menninir vóru bøndur, og at teir vóru í ferð við at rudda eitt jarðarstykki, tá flogfarið skjeyt rakettina eftir teimum.

Amerikanski verjumálaráðharrin, Donald Rumsfeld, sigur nú, at amerikanska herleiðslan veit ikki, hvørjir teir tríggir menninir vóru.

Washington Post skrivar, at tilburðurin í Zhavar Kili er eitt av fleiri dømum um, at amerikanararnir hava trupulleikar við at finna teir seinastu limirnar í al-Qaeda. Guvernørurin í Khosi-landspartinum í Afghanistan, Muhammed Ibrahim, sigur við blaðið, at amerikanska fregnartænastan stendur at kalla á berum í hansara landsparti.

Úr Norðurlondum:

### Nei til Jens

Ein meiningakanning í Norðurnoregi vísir, at alt færri og færri veljarar hjá Arbeiðaraflokkinum vilja hava fyrrverandi forsætisráðharran, Jens Stoltenberg, til floksformann. Av veljarum floksins í Nordland, Troms og Finnmark taka bara 25 prosent undir við Jens Stoltenberg, meðan 51 prosent halda, at onkur annar skal taka við eftir Thorbjørn Jagland.

Ólíka var fyri einum ári síðani. Tá valdu 40 prosent av øllum veljarunum í Troms Arbeiðaraflokkin, og Jens Stoltenberg var tann sterki maðurin.

### Størri bót

Danska stjórnin hevur boðað frá, at hon fer at seta ta loyvdu hámarksferðina á teinum donsku motorvegunum upp. Sum er hava danir loyvi at koyra 110 kilometrar um tíman, men ætlanin er at seta hámarkið til 130 km/t.

Men samstundis boðar stjórnin frá, at í framtíðini verður tað eisini dýrari at koyra ov skjótt. Sum er fáa tey, sum koyra 150 km/t, 1000 krónur í bót. Er ferðin 175 km/t, er bótin 2200 krónur.

### Sakna upplýsingar

Amerikanarar hava lagt tríggjar sviar undir at vera yvirgangsmenn, men verjarnir hjá teimum trimum kæra seg nú um, at teir fáa ikki tær neyðugu upplýsingarnar um sjálva skuldsetingina.

Verjarnir hava ígjøgnum uttanríkisráðið í Stockholm biðið amerikansku myndugleikarnar um avrit av upplýsingunum, men tá frágreiðingin kom, vóru fimm síður tiknar burturúr. Sambært uttanríkisráðnum hava amerikanarar sagt, at tær fimm síðurnar eru loyniligar, og tað vilja verjarnir ikki góðtaka.